INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Vestmanna Kommuna
Móttikið
1 6. SEP. 2009
J. nr. 2005 - 386

Vestmanna Kommuna

Vestmanna kommuna
Postboks 91
350 Vestmanna

15. september 2009
Mál: 1828-006/08-13
Tygara skriv:
Viðgjørt: KHP

**Viðvíkjandi broytingum í byggisamtyktini fyri Vestmanna kommunu**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009, hevur Vestmanna kommuna sent Innlendismálaráðnum uppskot til broyting í byggisamtyktini fyri Vestmanna kommunu til góðkenningar.

Kommunan biður í skrivi, dagfest 17. desember 2008, um loyvi at broyta byggisamtyktina soleiðis :

- Striking av havnarøki á Grønanesi
- Víðkan av havnarøki á Heyganesi og við nýggja havnarlagið
- Alment frítíðarøki Úti á Toft
- Alment frítíðarøki í Flatabø
- Striking av øki til almennar stovnar í Vestri og tilsvarandi víðkan av sethúsaøki
- Víðkan av vinnuøki við Hornaveg
- Alment frítíðarøki rundan um hylin innan fyri nýggja havnarlagið
- Broytingar og tillagingar av miðstaðar- og havnarøki Undir Holmbakka
- Víðkan av frílendinum omanfyri skúlan í Frammbø
- Broyting av ætlaðum vegi og sethúsaøkjum omanfyri Rógvu
- Burturtøka av ætlaðum gongugøtum í Garðastovubønum og ímillum Gerðisveg og Rógvuveg
- Nýtt parkeringsøki í Garðastovubønum
- Broyting av sethúsaøkjum og víðkan av frílendum á Fitjum
- Broyting av ætlaðum vegi og sethúsaøki ímillum Leitisveg og Ovara Veg víðkan av sethúsøki við Leitisveg
- Nýggj økir til frítíðar- og summarhús, húsvognar og tjalding uttan fyri Fossá í millum Ovara Veg og Niðara Veg og á økinum niðanfyri landsvegin Inni á Fjørð
- Harafturat eru fleiri tillagingar gjørdar í bygdaskipanini, so økismark og matrikulmark falla saman
- Byggisamtyktin – økisásetingarnar og byggifyriskipandi reglurnar – eru víðkaðar og dagførdar.

Broytingin hevur sambært Vestmanna kommunu ligið frammi frá 3. til 24. september 2008. Tá kærufreistin var úti tann 3. desember 2008, vóru trý mótmælir og tvey broytingaruppskot innkomin.

Innlendismálaráðið hevur havt málið til ummælis hjá Býarskipanarnevndini, sum hevur latið Innlendismálaráðnum álit í málinum, skriv dagfest 16. apríl l 2009.

Av tí at Býarskipanarnevndin ikki viðmælti øllum broytingunum, valdi Innlendismálaráðið at senda álitið frá nevndini til kommununa til viðmerkingar. Bygdarráðið hevur síðani samtykt at taka viðmerkingarnar frá Býarskipanarnevndini til eftirtektar.

Viðmerkjast skal, at Innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini, og vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Innlendismálaráðið, við heimild í § 4 í býarskipanarlógini, góðkennir at byggisamtyktin verður broytt sum omanfyri nevnt, tó í samsvar við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini, sjá álitið frá nevndini.

Hjálagt er rættaður byggisamtyktartekstur og rættað kortskjal við átekning frá Innlendismálaráðnum.

Vegna Innlendismálaráðið

Elsa Østergaard
ráðgevi